FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

| Meeting of the UFI Board of Directors | |
|---|---|
| **Date:** | March 4, 2022 |
| **Time:** | 3 hours (8:30-11:30) |
| **Place:** | The Faculty of History and Social Science (Jónas Broncks gøta 25) and on Zoom |
| **Participants:** | *Board members:*<br>Ólavur Ellefsen (Chair)<br>Marita Rasmussen (Deputy Chair)<br>Anders Bjarklev (External Member, participated via Zoom)<br>Elaine Munthe (External Member, participated via Zoom)<br>Marin Strøm (Staff Representative)<br>Jónrit Halling (Staff Representative)<br>Anita Hansen (Student representative)<br><br>*Deputy board members:*<br>Anna Kirstin Sigurðardóttir (Deputy External Representative)<br>Heidi Poulsen (Deputy External Representative)<br>Firouz Gaìni (Deputy Staff Representative)<br>Anna Sofía Lava (Deputy Staff Representative)<br>Elberg Elias Klettheyggj (Deputy Student Representative)<br><br>*University administration attendees:*<br>Chik Collins (Rector)<br>Johan Hansen (University Director)<br>Kristianna Balle (Executive Secretary)<br><br>Hugin Skaalum (Head of Finance, attending for Item 3)<br>Katrin Poulsen (Head of HR, attending for Item 7)<br><br>Could not attend:<br>Martin Zachariasen (Deputy External Representative – currently in an interim position at the University) |
| **Minutes by:** | Kristianna Balle |

*See Faroese translation on Page 8

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Agenda for Board Meeting: Friday 4th March 2022, 08:30-11:30

***Purpose of the meeting:***

*To report and discuss recent developments and forthcoming challenges, and progress against the commitments and priorities of the Strategic Plan, 2020-2024.*

**Agenda:**

**Part 1: 8:30-10:00**

1. Chair's welcome (including new student member for 2022) and approval of Agenda (Paper 1)
2. Approval of minutes from meeting of 26th November 2021 (Paper 2)
3. Finance Report – from Head of Finance: Board approval of accounts for 2021 and budget for 2022 (Paper 3)
    a. *Accounts for 2021*
    b. *Budget for 2022*
4. Report on consultations since last meeting (Paper 4)
5. Rector's Report on period since last meeting (Paper 5)

**09:50-10:10**

*Comfort and Refreshment Break*

**Part 2: 10:10-11:30**

6. Rector's report on progress against commitments and priorities in the *Strategic Plan, 2020-2024* (Paper 6)
7. Report on Staff Survey, 2021 (Presentation from HR)
8. Update from the Campus Group (Oral report from Chair)
9. Chair's summation and concluding remarks

1. **Chair's welcome (including new student member for 2022) and approval of Agenda (Paper 1)**
   The agenda for today's meeting was approved without amendment.

2. **Approval of minutes from 26th November 2021 (Paper 2)**
   The minutes from November 26th were also approved without amendment.

3. **Finance Report – from Head of Finance: Board approval of accounts for 2021 and budget for 2022 (Paper 3)**
   a) *Accounts for 2021*
   The Head of Finance presented the accounts for 2021. The budget has been adjusted during the year and when some of the remaining funds have been absorbed by external projects there is a current surplus of around 100,000 kr which is likely to reduce further before the final closing of the accounts for 2021. The Head of Finance informed that we aim at being as close to zero as possible as we cannot transfer money to the next year. Overall, the faculties have spent less on salaries than originally intended, and the main reason is that we have not been able to hire employees as planned and, in some cases, we have not been able to re-employ staff. This means that we have been able to do more purchasing than we had envisaged earlier, which is positive – there have been many things which we have been needing.
   The Head of Finance then showed the breakdown of expenditure across the year, where we also received some extra grant from government to spend towards an extra intake of nurses. The pattern in spending across the year from 2017 to 2021 was also presented.
   The Rector highlighted two things relevant to points made by board members in March 2021. Firstly, there was an improvement in the pattern of spending across the year – with less of a 'spike' towards the end. This reflected improved planning in the management of finances within the University Leadership Team. Secondly, he highlighted the improvement in income generation across the University, much of it arising from additional teaching. This is something we will be seeking to build upon.
   The meeting then approved the accounts for 2021.
   b) *Budget for 2022*
   The Head of Finance then presented the budget for 2022. The grant from government was 132 million and the priorities from the Ministry are to have an extra uptake in nursing, the BSc/MSc in IT and to employ a new IT manager. The budget is set to 136 million which means that we are increasing the income with 4 million that we did not get from government funding. We are taking one million from external income to the main account. Overall, it gives us a budgeted surplus of 29.000 kr. The Rector stressed that it was unfortunate that we are having to use the additional income we are generating to fill a funding shortfall in the government budget – which gave us some 4 million less than we needed to carry on with existing activities.
   After the presentations the board members had some comments and questions. It was asked why there was a saving for 3.1 million at SSD for 2021. Head of Finance explained that it was from the Beta files project and from Búskaparráðið. It was also asked if the faculties were aware that they will need to increase the income to cover the 4 million deficit. The Rector answered that this is not speculative income, but it is income that we know is coming.
   There was then a comment about the cost for e.g. electricity, oil and energy. It is likely that the energy prices will be affected in the near future, and we could expect a significant extra cost the upcoming year. The Rector explained that we can go back to the Ministry and ask for supplementary grant but in general, there is some potential for savings in the different buildings. There is also the fact that we are owed money by the local municipality – now some 1.5 million – for the heating of the school building at Frælsið. The Ministry has asked us not to bill the municipality for this money for the time being. We will manage the budget carefully.

There was also a clarification question about the redistribution of the overhead from external projects and whether we have a specific way to distribute the overhead. The answer was that we have a framework were some of it will go to main the operation and some will go to the faculties.

It was asked why the rent was increasing and the explanation was that we are preparing to rent extra rooms for extra teaching facilities.

Finally, the budget for 2022 was approved by the Board.

**4. Report on consultation since last meeting (Paper 4)**

On a regular basis the University is asked to respond to hearings. The University Director went through the consultations and gave a summary of the answers. The Director explained that when a hearing request is sent to the University, we identify someone who is a subject field expert to provide the answer, but all answers are sent from the University Director.

It was mentioned that some had difficulties accessing the files in the document and we will therefore think of a new way to share the files for the next meeting.

**5. Rector's Report on period since last meeting (Paper 5)**

The Rector had made the report available in advance. The Rector explained that since the last meeting the key challenges have been the omicron variant of corona, the budget for 2022 and uncertainties about the lease at Sjóvinnuhúsið where two faculties are today.

The Rector then went through these items:

- Covid 19/Omicron
- Finances for 2022
- Recruitment of New Staff
- External Review of the University
- Pro-Rector/Leadership of the Quality Unit
- Staff Survey, 2021
- My Contribution and Professional Development Conversation
- Securing Accreditation of our Law Programme for graduates to practice law in the Kingdom of Denmark
- University of the Highlands and Islands

A board member thanked the Rector for sending the report, which the member always finds very helpful and informative, and for presenting it. The member asked if the number of staff increases for each number of students and the Rector explained that we look at staff requirements and the additional staff that we have employed will not increase each time there will be an extra intake of students.

There was a question about the staff survey and if it was going to be a regular recurring survey. The Rector would expect the next survey to be in 2023/24 and added that we will also have regular student surveys every two years, and it might make sense to have the surveys on alternate years.

**6. Rector's report on progress against commitments and priorities in the *Strategic Plan, 2020-2024* (Paper 6)**

The Rector gave a presentation (circulated in advance and included in the board papers) with the key assessments. We are at a stage where consolidating what we have achieved is very important. In general, the Rector believes that we are on a good trajectory of good improvement and the challenge is to continue this progress in a balanced way.

The Rector reported on the progress for each of the commitment and priorities broadly as follows:

- Education and Student Success:
    - Staff at the Quality Unit are rising from 1.5 to 2 persons and a key focus is on developing and implementing course evaluation.
    - Portfolio: substantial change over the past two years and a systematic top-down portfolio review planned after the External Review.
    - We have seen major progress with *having* data on students; progression, retention, satisfaction and destinations, and some encouraging data on aspects of student satisfaction and on destinations. Work to do on progression and retention.
    - In terms of learning, living and social environment there have been some small improvements, but major improvements are needed.
- Research and enterprise:
    - The staff at the Research and Enterprise Unit are also rising from 1.5 to 2 persons.
    - Research outputs and trajectory data is incomplete, but we are ahead of the target in the strategic plan.
    - Research applications is a key area to address.
    - The research environment is strengthening, but a lot more to be done and we need a higher proportion of research staff at some faculties.
- People and organizational development:
    - As previously reported, we have seen extensive development with modernising and professionalising the structures and now we are consolidating these.
    - There have been investments and development in HR.
    - The communication is improving, and that work is ongoing.
- The Faroese Language:
    - A language policy was approved in March 2021, and we need the language forum group to become active.
    - We have a summer course in Faroese and there is new programme in teaching Faroese as an additional language.
- External Engagement and Partnership:
    - As reported previously we are collaborating with external partners, e.g. KT-felagið, Bakkafrost, NUSCT, Betri and BankNordik.
    - The public engagement seems good.
- Resources:
    - The resources are a challenge for us and although there is some progress, more must be done.
    - We are part of a project to develop a new integrated IT system for Faroese education.
    - A new position as Head of IT will soon be advertised.

The Rector summed up the key messages which are that the last 6 months have been demanding but much progress has been consolidated the last 18 months. The Rector added that we can begin to think about the next Strategic Plan in the latter part of this year or early 2023.

There was a question about the research applications and funding. Anna Sofía Lava who works in the Research and Enterprise Unit (REU) explained that the REU are informing about deadlines for applying for grants and the unit is really trying to improve the number

and the quality of applications, but unfortunately, at times there seems to be little interest; especially in applying for funding abroad. It is difficult to say what the reason is, but we must investigate using management tools. A board member had a comment about the application process and mentioned that it is difficult to apply on your own and that it was an idea to let researchers be part of research groups and go to conferences to network because grants often rely on personal connections.

A board member asked about the small improvements in student learning, living and social environment. The Rector explained that these improvements are connected to the campus plan and campus development. There are also things in the short term that might be done.

The Board was very happy with the presentation and with the consolidation and further progress which it indicated, especially given the very challenging circumstances over the past months, and indeed across the whole period since the *Plan* started to be implemented. The Board expressed appreciation for the hard work and commitment of the University's staff and students in delivering a lot of progress.

**7. Report on Staff Survey 2021 (Presentation from HR)**

Katrin Poulsen, HR coordinator, presented the results from the staff survey, which was conducted in November 2021. HR asked a Danish company, Ennova, to help us with the survey which gave us the possibility to benchmark ourselves both to other Faroese employers, and also to other higher education institutions in the Nordic region.

The response rate was 94% with a total of 130 respondents. The PhD students (20) were not included but will participate in a similar survey in the spring. The overall result for the whole university shows good numbers for loyalty and for satisfaction and motivation.

Katrin Poulsen explained that in the survey staff were asked questions in 7 different areas: *reputation, senior management, immediate manager, co-operation, working conditions, job content, learning and development*.

Katrin Poulsen showed the results from UFI and compared the result to other organisations in the Faroe Islands and to other institutions within higher education in the Nordic. Katrin also showed that there are differences between faculties, between functions and between genders. In general, females are more satisfied than males and the results shows that we have more challenges with certain faculties and with certain categories of staff.

Katrin Poulsen has presented the results at all faculties and afterwards, faculties have spent time discussing the results. The results have also been discussed in the collaboration committee and in the health and safety committee. All departments have plans for the follow-up in one way or another.

The Rector had some comments about the two faculties with the lowest score and wanted to add that the result from those faculties shows a broad standard deviation.

A board member thanked Katrin for the data and the presentation and observed that in many ways the results are actually quite positive and encouraging, also adding that not only the leadership, but everyone must try to see it as their responsibility to address key challenges.

The board members took some time to discuss the results at the faculty of science and technology which had some challenging outcomes. It was seen as a clear message, and they need help – perhaps external help – to deal with the issues. Help has previously been offered but has not yet been taken up. A board member also showed concern about how we are going to integrate the six new staff that will arrive at the department later in the year. It was brought up that offering a mentor can be helpful for new staff. The Rector responded that we have done a lot to focus on and support the faculty; we have redeveloped the programmes, increased staffing, and invested in equipment and labs, but we have not been able to support the dean

with a faculty leadership team – staff have not been very willing to do that. The Rector would welcome an external intervention if the staff at NVD embrace it as we need constructive engagement and commitment. As things are now, a task force is being created with the Dean and various staff, and with the support of Martin Zachariasen.

A board member mentioned that it is a question about culture and that it can be hard to change and his view we must change it from the inside and out – and perhaps change the structure of the organisation, if necessary. It can be a particular challenge if one has a high proportion of senior academics in a faculty if they are not contributing positively to leadership.

A board member mentioned that if we are going to do the survey again, we should consider how we evaluate the manager at the departments with very few staff who therefore cannot evaluate on the immediate manager.

A board member said that it is good that something is being done at the faculty of science and technology and that ultimately, we can consider reorganizing if that is needed. The board member reinforced the view of other board members that staff must be expected to take ownership of the challenges, with support provided for that.

That said, the view of the board was that notwithstanding the challenges, the overall score for the survey is good, and would be even better if some of these challenges could be addressed and improvements realised.

**8. Update from the Campus Group**

The Chair informed that we got 5 million in grant for an architectural competition regarding the main campus building and an overall plan for the whole campus. The campus group is currently working on investigations about moving the two faculties at Sjóvinnuhúsið to Frælsið and the Chair presented a preliminary report on that work. Overall, it looks like it might be possible to move the two departments, but it is crucial that sufficient time and funding is available, because the buildings at Frælsið are not in a good condition as it is.

A student representative asked how a move will affect the student wellbeing. The answer was that so far, the investigations have been limited to see how many square meters are needed and that student needs will be taken into account before the work is finished. The student's main concern was that the students will be worse off than they are at Sjóvinnuhúsið.

A board member mentioned that with the additional intakes for nursing, IT and maybe also pedagogues there will be an urgent need for additional space within this year, and that also needs to be solved.

A board member informed that the Icelandic University is moving to another building where they reconsider the needs for learning and for university. She was encouraging UFI to create something different with this opportunity.

9. **The Chair's summation and concluding remarks**

The Chair concluded the meeting. The next meeting will be on the 10th of June.

**The meeting ended at 11.30**

**Føroysk umseting av fundarfrásøgnini frá stýrisfundinum 4. mars 2022**

***Endamálið við fundinum:***
*At greiða stýrinum frá gongdini í seinastuni og umrøða framstigini í nøkrum av høvuðsmálunum í strategiætlanini 2020-2024.*

**Fundarskrá:**

1. Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin (og bjóðar nýggja studentaumboðnum vælkomnum), og góðkenning av fundarskrá (skjal 1)
2. Góðkenning av fundarfrásøgn frá 26. november (skjal 2)
3. Fíggjarfrágreiðing – frá fíggjarleiðaranum (skjal 3)
    a. Roknskapur fyri 2021
    b. Fíggjarætlan fyri 2022
4. Frágreiðing um hoyringar síðan seinasta fund (skjal 4)
5. Frágreiðing frá rektaranum um gongdina síðan seinasta fund (skjal 5)
6. Frágreiðing frá rektaranum um framgongd við at røkka málum og miðum 2020-2024 í strategiætlanini (skjal 6)
7. Úrslit frá trivnaðarkanningini millum starvsfólk (framløga frá HR)
8. Dagføring frá kampusbólkinum (munnlig frágreiðing)
9. Stýrisformaðurin tekur samanum

1. **Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin (og bjóðar nýggja studentaumboðnum vælkomnum), og góðkenning av fundarskrá (skjal 1)**
   Fundarskráin fyri fundin varð góðkend uttan broytingar.

2. **Góðkenning av fundarfrásøgn frá 26. november (skjal 2)**
   Fundarfrásøgnin frá 26. november varð eisini góðkend uttan broytingar.

3. **Fíggjarfrágreiðing – frá fíggjarleiðaranum (skjal 3)**
   a) *Roknskapur fyri 2021*
   Fíggjarleiðarin legði roknskapin fyri 2021 fram. Roknskapurin hevur verið tillagaður gjøgnum árið og tá ið nakað av avlopinum verður flutt til uttanhýsis verkætlanir, so er avlopið uml. 100.000 kr., sum møguliga minkar meira áðrenn roknskapurin fyri 2021 endaliga verður lokaður. Fíggjarleiðarin kunnaði um, at vit miða ímóti at koma so tætt at null sum møguligt, tí tað ber ikki til at flyta yvirskot yvirum ár. Sum heild hava deildirnar brúkt minni pengar upp á lønir enn upprunaliga væntað, og høvuðsorsøkin til tað er, at vit ikki, sum ætlað, hava sett nýggj fólk í starv, og í summum førum hava vit ikki megnað at leingja starvssetanir. Av somu orsøk hava vit gjørt fleiri keyp enn vit høvdu ímyndað okkum, og tað er jaligt – tí okkum hevur tørvað ymisk ting.
   Fíggjarleiðarin vísti síðani útgreinaðu útreiðslurnar í árinum, og vísti, at vit fingu eina eykajáttan frá landsstýrinum at brúka til eina eyka upptøku í sjúkrarøktarfrøði. Mynstrið í útreiðslum fyri árini 2017 til 2021 varð eisini lagt fram.
   Rektarin gjørdi vart við tvey ting, sum svar til tær viðmerkingar sum stýrislimir gjørdu á fundi í mars 2021. Fyri tað fyrsta, at mynstrið í útreiðslum nú er betri spjatt yvir árið – við einum minni 'tindi' mótvegis endanum av árinum. Hetta kemst av, at fíggjarætlanin er betri stýrd og planløgd í leiðslutoyminum. Í øðrum lagi eru inntøkurnar á øllum Setrinum hækkaðar, og nógv av tí kemst av eyka undirvísing. Tað fara vit at gera meira við framyvir.
   Roknskapurin fyri 2021 varð síðani góðkendur.

   b) *Fíggjarætlan fyri 2022*
   Fíggjarleiðarin legði so fíggjarætlanina fyri 2022 fram. Játtanin frá landsstýrinum var 132 milliónir kr. og raðfestingarnar hjá Mentamálaráðnum eru, at vit halda fram við at hava eina eyka upptøku til sjúkrarøktarvísindi, bachelorútbúgving- og masterútbúgving í KT og at vit fáa sett ein nýggjan KT-leiðara. Fíggjarætlanin er sett til 136 milliónir sum hevur við sær, at vit hækka inntøkurnar við 4 milliónum, sum vit ikki fingu játtað frá landsstýrinum. Ein millión verður tikin frá uttanhýsis inntøku og flutt til høvuðskontuna. Samanumtikið er avlopið á fíggjarætlanini 29.000 kr. Rektarin legði dent á, at tað er óheppið, at vit eru noydd at brúka eyka inntøku til at fíggja tað, ið restar í játtanini frá landsstýrinum – sum gav okkum umleið 4 milliónir minni enn vit høvdu tørv á fyri at halda fram við verandi virksemi.
   Aftan á framløgurnar komu stýrislimirnir við spurningum og viðmerkingum. Ein spurdi, hví Søgu- og samfelagsdeildin hevði eina sparing á 3,1 millión fyri 2021. Fíggjarleiðarin greiddi frá, at hetta komst av, verkætlanini við skjølunum frá P/f Beta og frá Búskaparráðnum. Onkur spurdi eisini, um deildirnar eru greiðar yvir, at tær mugu økja um inntøkurnar fyri at rinda tær 4 milliónirnar, sum eru í undirskoti. Rektarin svaraði, at talan er ikki um óvissa inntøku, men inntøku, sum vit vita fer at koma.
   Onkur hevði eisini eina viðmerking til útreiðslurnar til t.d. streym, olju og hita. Tað er sannlíkt, at orkuprísirnir fara at verða ávirkaðir í nærmastu framtíð, og vit kunnu rokna við, at tað komandi árið gerst ein eyka útreiðsla, ið munar. Rektarin greiddi frá, at vit kunnu heita á Mentamálaráðið og biðja um eykajáttan, men sum heild eru nakrar møguligar sparingar at heinta í ymsum bygningum. Tað er eisini soleiðis, at Tórshavnar Kommuna skyldar okkum uml. 1,5 milliónir fyri hita til bygningin á Frælsinum.

Mentamálaráðið hevur biðið okkum um ikki at krevja pengar inn frá kommuni fyribils. Vit fylgja gongdin í fíggjarætlanini neyvt.

Ein annar vildi hava greiðu á, hvussu rakstrargjald frá uttanhýsis verkætlanum verður býtt og um vit hava ein ávísa máta at býta rakstrargjaldið. Svarið var, at vit hava ein leist, har ein partur fer til høvuðskontuna og ein partur fer til deildina.

Onkur spurdi, um hví kostnaður fyri leigu veksur og grundgevingin var, at vit fyrireika okkum upp á at leiga eyka høli til eyka undirvísing.

At enda góðkendi stýrið fíggjarætlanina fyri 2022.

**4. Frágreiðing um hoyringar síðan seinasta fund (skjal 4)**

Setrið verður regluliga biðið um at koma við svari til ymsar hoyringar. Fyrisitingarstjórin fór ígjøgnum hoyringarnar og gav stuttan samandrátt av svarunum. Fyrisitingarstjórin greiddi frá, at tá ein hoyring verður send til Setrið, so finna vit onkran, ið er serkønur á økinum at svara, men øll svar verða at enda send frá fyrisitingarstjóranum.

Summi høvdu havt trupult við at opna skjølini í fíluni og vit fara tískil at finna onkran annan máta at deila skjølini til næsta fund.

**5. Frágreiðing frá rektaranum um gongdina síðan seinasta fund (skjal 5)**

Rektarin sendi stýrislimunum frágreiðingina áðrenn fundin. Rektarin greiddi frá, at síðan seinasta fund hava høvuðsavbjóðingarnar verið koronufrábrigdi omikron, fíggjarætlanin fyri 2022 og ivamál um útleiganina av Sjóvinnuhúsinum, har tvær deildir húsast í dag.

Rektarin tosaði síðan um hesi evni:

- Korona/Omicron
- Fíggjarætlanin fyri 2022
- At seta nýggj fólk í starv
- Uttanhýsis eftirmetingin av Setrinum
- Pro-rektari í góðsku/leiðsla í góðskueindini
- Trivnaðarkanning 2021
- Menningarsamrøðan
- At tryggja, at løgfrøðiútbúgvingin á Setrinum verður góðkend í danska ríkinum
- University of the Highlands and Islands

Ein stýrislimur takkaði rektaranum fyri at senda frágreiðingina, sum limurin altíð helt vera sera gagnliga og upplýsandi og fyri at leggja frágreiðingina fram. Stýrislimurin spurdi um talið av starvsfólkum økist fyri hvønn lesandi, og rektarin greiddi frá, at vit hyggja eftir tørvinum á starvsfólki og tey eyka starvsfólkini, sum vit hava sett, fara ikki at vaksa hvørja ferð, at tað verður ein eyka inntøka av lesandi.

Ein spurningur var um trivnaðarkanningina og um kanningin fór at verða gjørd regluliga. Rektarin væntar, at næsta kanning verður í 2023/24 og legði afturat, at vit eisini fara at hava regluligar trivnaðarkanningar millum tey lesandi annað hvørt ár og at tað er skilabest at leggja kanningarnar, so tær ikki liggja sama ár.

**6. Frágreiðing frá rektaranum um framgongd við at røkka málum og miðum í strategiætlanini fyri 2020-2024 (skjal 6)**

Rektarin greiddi frá tí týdningarmestu framgongdini (sum varð sent stýrislimunum frammanundan). Vit eru í eini støðu, har tað er sera umráðandi at styrkja og stovnfesta tey avrik, sum vit hava nátt. Rektarin heldur sum heild, at vit eru á góðari kós mótvegis framburði og avbjóðingin er at halda fram við framgongdini á ein skilagóðan hátt.

Rektarin greiddi frá framstigunum í høvuðsheitum fyri hvørt av málunum og miðunum:

- At menna lesturin og tey lesandi
    - Talið av starvsfólkum í góðskueindini verður økt úr 1,5 til 2 og eitt umráðandi arbeiðsøki er at menna skeiðseftirmetingar og seta tær í verk.
    - Úrval av útbúgvingum: ein munandi broyting hevur verið tey seinastu tvey árini og ein skipað tilgongd, sum er stýrd úr evra, fer eftir ætlan at vera aftan á uttanhýsis eftirmetingina.
    - Vit hava sæð stór framstig av at hava hagtøl um lesandi; støðufesti, fráfall, nøgdsemi og hvar tey fara eftir loknan lestur. Vit mugu arbeiða við støðufesti og fráfalli.
    - Í mun til at stimbra og styrkja lestrarumhvørvi, frítíðarmøguleikar og íbúðarviðurskifti hjá okkara lesandi, so hava verið onkrir smávegis batar, men enn er tørvur á stórum ábótum.
- Gransking og framtak
    - Talið av starvsfólkum í granskingar- og framtakseindini verður eisini økt úr 1,5 til 2 starvsfólk.
    - Hagtøl fyri gransking eru ófullfíggjað, men vit eru komin longri enn málið, sum var sett í strategiætlanini.
    - Tað er umráðandi at arbeiða meiri við granskingarumsóknum.
    - Granskingarumhvørvið er styrkt, men nógv meiri eigur at vera gjørt og vit mugu hava lutfalsliga fleiri starvsfólk at granska á summum deildum.
- At menna fólk og stovn
    - Sum greitt frá áður, so hava verið nógv framstig við at modernisera og professionalisera arbeiðshættirnar og nú mugu vit stovnfesta teir.
    - Tað hava verið gjørdar íløgur í HR og framgongd hevur verið.
    - Framstig eru við samskiftinum og hetta arbeiðið heldur fram.
- Føroyska málið
    - Ein málpolitikkur varð góðkendur í mars 2021 og vit mugu nú fáa málráðsbólkin at virkaf.
    - Vit halda eitt summarskeið í føroyskum og so er ein nýggj útbúgving í at undirvísa í føroyskum sum øðrummáli.
- Uttanhýsis tilknýti og samstarv
    - Sum greitt frá áður, so samstarva vit við uttanhýsis partar, t.d. KT-felagið, Bakkafrost, NUSCT, Betri og Bank Nordik.
    - Miðling og almenn luttøka tykist góð.
- Tilfeingi
    - Tilfeingið er ein avbjóðing og hóast nøkur framstig eru, so eigur meira at gerast.
    - Vit eru partur av eini verkætlan at menna og seta í verk eina nýggja KT-skipan fyri alt skúlaverkið í Føroyum.
    - Eitt nýtt starv sum KT-leiðari á Setrinum verður lýst leyst í næstum.

Rektarin tók samanum høvuðsniðurstøðurnar, sum eru, at teir síðstu 6 mánaðirnir hava verið krevjandi, men at samanumtikið hevur verið framgongd seinastu 18 mánaðirnar. Rektarin legði afturat, at vit kunnu byrja at hugsa um ta næstu strategisku ætlanina seinni í hesum árinum ella tíðliga í 2023.

Ein spurdi um granskingarumsóknir- og stuðul. Anna Sofía Lava, sum arbeiðir í granskingar- og framtakseindini (REU) segði frá, at REU kunnar um umsóknarfreistir fyri at søkja um stuðul, og at eindin roynir at økja um talið av umsóknum og betra um góðskuna av umsóknunum, men tíverri tykist tað at vera lítil áhugi til tíðir; serliga tá tað kemur til at søkja um stuðul uttanlands. Tað er torført at siga, hvør orsøkin er, men vit mugu kanna tað við at brúka leiðsluamboð. Ein stýrislimur hevði eina viðmerking til tilgongdina at søkja um stuðul og vísti á, at tað er trupult at søkja einsamallur og nevndi sum hugskot at lata granskarar vera partar av granskingarbólkum og

at fara til ráðstevnur at fáa sambond, tí at stuðul, sum verður latin, er ofta bundin at persónligum sambondum.

Ein stýrislimur spurdi um teir smávegis batarnar í lestrarumhvørvinum, frítíðarmøguleikum og íbúðarviðurskiftum hjá teimum lesandi. Rektarin segði, at hesir batarnir hanga saman við kampusætlanini. Tað er eisini ymiskt, sum kann gerast her og nú.

Stýrislimirnir vóru væl nøgdir við framløguna og arbeiðið við at styrkja nýggjar arbeiðshættir og framgongdina sum hevur verið nevnd, og serliga tá hugsað verður um tær avbjóðandi umstøðurnar, sum hava verið teir seinastu mánaðirnar, í roynd og veru alt tíðarskeiðið síðan strategiætlanini bleiv sett í verk. Stýrið virðismetti, hvussu íðin og fús starvsfólk og lesandi á Setrinum hava verið fyri at røkka nógvu framgongdini.

**7. Úrslit frá trivnaðarkanningini millum starvsfólk 2021 (framløga frá HR)**

Katrin Poulsen, HR-samskipari, legði úrslitini frá trivnaðarkanningini sum var gjørd millum starvsfólk í november 2021. HR-deildin hevði biðið donsku fyritøkuna Ennova um at hjálpa okkum við spurnakanningini, og tað gjørdi tað møguligt at samanbera okkum við aðrar føroyskar stovnar og eisini við aðrar hægri lærustovnar í Norðanlondum.

Svarluttøkan var 94% og í alt høvdu 130 svarað. Tey ph.d.-lesandi vóru ikki við í hesi kanningini, men ein líknandi kanning verður í vár. Samlaða úrslitið fyri alt Setrið vísir góð úrslit fyri trúfesti og fyri nøgdsemi og motivatión.

Katrin Poulsen greiddi frá, at tað í kanningini varð spurt til 7 ymisk øki: *umdømi, ovasti leiðari, næsti leiðari, samstarv, arbeiðsumstøður, arbeiðisinnihald og førleikamenning.*

Katrin Poulsen vísti úrslitini frá Setrinum og samanbar tey við úrslit frá øðrum stovnum í Føroyum og við aðrar hægri læristovnar í Norðanlondum. Katrin vísti eisini, at tað eru munir millum deildir, millum starvsbólkar og millum kynini. Samanumtikið eru kvinnurnar meiri nøgdar enn menninir og úrslitið vísir, at vit hava fleiri avbjóðingar á summum deildunum enn á øðrum og við ávísum starvsbólkum.

Katrin Poulsen hevur lagt úrslitini fram á deildunum og aftaná hava deildirnar umrøtt úrslitini. Úrslitini hava eisini verið løgd fram fyri samstarvsnevndina og fyri trygdarnevndina. Allar deildir hava onkra ætlan fyri, hvussu tey skulu viðgera úrslitini.

Rektarin hevði onkrar viðmerkingar til tær báðar deildirnar, sum ikki stóðu seg so væl, og vísti á, at úrslitini frá hesum deildunum vísa, at stórur munur er á, hvat starvsfólk har halda.

Ein stýrislimur takkaði Katrini fyri hagtølini og framløguna og legði til merkis, at úrslitini í nógvar mátar eru rættiliga jalig og hugalig, og legði eisini afturat, at ikki bert leiðslan, men øll mugu royna at síggja tað sum sína ábyrgd at gera nakað við høvuðsavbjóðingarnar.

Stýrislimirnir brúktu tíð at umrøða úrslitini á náttúruvísindadeildini, ið hevði ymsar avbjóðingar. Úrslitið stóð greitt og tey hava tørv á hjálp – møguliga uttanhýsis hjálp – at arbeiða við avbjóðingunum. Deildin hevur havt í boðið at fáa stuðul fyrr, men hevur ikki tikið av. Ein stýrislimur stúrdi eisini fyri, hvussu vit fáa tey seks nýggju starvsfólkini, ið koma seinni í ár, at fella inn í starvsfólkahópin. Onkur nevndi, at tað kann hjálpa nýggjum starvsfólkum, um tey fáa ein leiðbeinara (ein mentor). Rektarin segði, at vit hava gjørt eina rúgvu fyri at stuðla deildini; vit hava ment útbúgvingar av nýggjum, økt um starvsfólkatalið og gjørt íløgur í útgerð og royndarstovur, men vit hava ikki megnað at stuðla dekaninum við eini deildarleiðslu – starvsfólk hava ikki verið sinnað at gera tað. Rektarin hevði gleðiliga tikið ímóti eini uttanhýsis uppílegging, um starvsfólk á deildini høvdu tikið væl ímóti tí. Men sum støðan er nú, so verður ein arbeiðsbólkur settur við dekaninum og øðrum starvsfólki og við stuðli frá Martin Zachariasen.

Ein stýrislimur nevndi, at tað er ein spurningur um mentan, og at tað kann vera trupult at broyta, og eftir hansara tykki er neyðugt at broyta støðuna innanífrá – og um neyðugt møguliga broyta bygnaðin á deildini. Tað er serliga ein avbjóðing um nógvi eldri starvsfólk eru á eini deild, sum ikki stuðla leiðsluni á jaligan hátt.

Ein stýrislimur nevndi, at um vit ætla at gera trivnaðarkanningina aftur, so mugu vit umhugsa, hvussu vit eftirmeta leiðarar á deildunum við fáum starvsfólkum, sum tískil ikki kunnu eftirmeta nærmasta leiðara.

Ein stýrislimur segði, at tað er gott, at okkurt verður gjørt á Náttarvísindadeildini, og at vit mugu umhugsa at skipa deildina øðrvísi um neyðugt. Stýrislimurin tók undir við sjónarmiðnum hjá øðrum stýrislimum, um at tað má væntast av starvsfólkunum, at tey taka ábyrgd av avbjóðingunum og fáa stuðul til tað.

Tá tað er sagt, so heldur stýrið hóast avbjóðingarnar, at tað yvirskipaða úrslitið fyri kanningina var gott og hevði verið enn betri, um onkrar av avbjóðingunum vóru tiknar upp til viðgerð og um ábøtur vórðu framdar.

**8. Dagføring frá kampusbólkinum (munnlig frágreiðing)**

Stýrisformaðurin kunnaði um, at vit hava fingið 5 milliónir til eina arkitektakapping fyri høvuðsbygningin og eina heildarætlan fyri kampus. Kampusbólkurin arbeiðir í løtuni við at kanna, hvat krevst fyri at flyta tær báðar deildirnar sum húsast í Sjóvinnuhúsinum til Frælsið, og stýrisformaðurin vísti nakrar innleiðandi greiningar, um hvussu tað kann fara fram. Samanumtikið sær tað út til, at tað kann lata seg gera at flyta báðar deildirnar, men tað er avgerandi, at nóg nógv tíð og peningur verður sett av, tí bygningarnir á Frælsinum eru ikki í góðum standi.

Eitt umboð fyri tey lesandi spurdi, hvussu flytingin fer at ávirka trivnaðin hjá teimum lesandi. Svarið var, at inntil víðari hava kanningarnar verið avmarkaðar til einans at hyggja eftir, hvussu nógvir fermetrar skulu til fyri at flyta deildirnar, og at trivnaðurin hjá teimum lesandi verður tikin við í greiningina áðrenn arbeiðið er liðugt. Størsti óttin hjá teimum lesandi er, at umstøðurnar fara at versna, um tey flyta út úr Sjóvinnuhúsinum.

Ein stýrislimur nevndi, at um ein eyka upptøka verður í sjúkrarøktarfrøði, KT og kanska eisini í námsfrøði, so verður ein stórur tørvur á fleiri hølum longu í ár, og tað mugu vit eisini finna eina loysn til.

Ein stýrislimur kunnaði um, at Háskóli Íslands flytur til ein annan bygning, har krøvini til undirvísing og universitet verða hugsað av nýggjum. Hon eggjaði Setrinum til at skapa okkurt øðrvísi við hesum møguleikanum.

**9. Stýrisformaðurin tekur samanum**

Stýrisformaðurin tók samanum. Næsti fundur verður 10. juni.

**Fundurin endaði kl. 11.30**